# Almannastovan

## Stuðulsfólk

**Søkt verður eftir stuðulfólki til eina familju í Norðurstreymoy.**

Talan er um eitt fjøltátta starv við ymiskum arbeiðsuppgávum og avbjóðingum.

Uppgávan hjá stuðulinum er, í samráð við familjuna og avvarðandi myndugleikar, at skipa gerandisdagin, veita familjuni ráð- og vegleiðing og stuðla børnunum í teirra menning.

Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Stuðulin er játtaður fram til 31. desember 2005.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráði og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Vegna serligar umstøður skulu umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, vera Almannastovuni í hendi skjótast gjørligt og í seinasta lagi 20. juli 2005 og skulu stílast til:

**Almannastovan**
att: Sigrun Bærentsen
Postsmoga 3096
Smyrilsvegur 20
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sigrun Bærentsen, tlf. nr. 35 35 10, lokal 1172, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 15.00.

# Umsitingarligur leiðari

Sands Kommuna søkir eftir umsitingarligum leiðara at byrja 15. august 2005, ella eftir nærri avtalu. Starvið er fulltíðarstarv.

**Umsitingarligi leiðarin:**

- hevur ábyrgdina av dagligu umsitingini og skrivstovuavgreiðsluni, og virkar sum skrivari á stýrisfundunum.
- hevur ábyrgdina av samlaðu fíggjarumsitingini hjá kommununi. Herundir bókhald, roknskap og fíggjarætlanargerð.
- virkar sum ráðgevi hjá borgarstjóranum og kommunustýrinum.

Tú kemur at arbeiða í einum avbjóðandi umhvørvi, har dentur verður lagdur á at veita borgarunum eina góða og javnbjóðis tænastu. Stórur dentur verður lagdur á at menna eina opna og gjøgnumskygda umsiting.

Vit vænta at tú er álítandi, fyrikomandi og hevur samstarvsevnir í einum umhvørvi við skiftandi politiskum stýrum. Roknast skal við at starvsinnihaldið kann broytast í tráð við komandi ábyrgdarbroytingar millum land og kommunu.

Tú hevur holla útbúgving innan umsiting og leiðslu, og tú hevur royndir á umsitingarliga økinum. Hægri útbúgving er ein fyrimunur.

Umsóknarfreistin er 1. august.
Umsóknir verða at stíla til Sands kommunu, FO-210 Sandi.

**Sands Kommuna**

# Hjálparfólk

Søkt verður eftir 1 hjálparfólki 21tímar um vikuna, at byrja 1.septembur 2005.

Dr. Margrethu Barnagarður er normeraður til 94 børn í aldrinum 0 til 7 ár sum eru bólkaði soleiðis :

- 1 vøggustova á 10 børn í aldrinum 0 til 3 ár.
- 3 barnagarðsstovur á 21 børn í aldrinum 3 til 5/6 ár.
- 1 forskúlastovu á 21 børn í aldrinum 6 til 7ár.

Barnagarðurin er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er, at hava umsorgan fyri børnum í aldrinum 0 til 7 ár og á einum kristnum støði, at menna tey í tryggum viðurskiftum á uppalingarligan fullgóðan hátt.

Vit ynskja tí at umsøkjarin :

- Hevur góð samstarvsevnir.
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi.
- Skal kunna arbeiða sjálvsstøðugt.
- Dugir at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum.
- Hevur ábyrdarkenslu.

Vit kunnu bjóða tær :

- Ein stovn í menning, hvar tú fart møguleikan at seta tín dám á dagligdagin.
- Ein vælvirkandi starvsfólkabólk.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi.
- 94 praktfull børn.

Vit vanta at tú saman við okkum skapar eitt gott umhvørvi á stovninum.

Lønar- og setanarviðurskiftir sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, lønarstig 5 / 9.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. august 2005.

**Dr. Margrethu Barnagarður**
Gerðagøta
FO-700 Klaksvík

# Mattænasta til pensionistar

Sjóvar kommuna ætlar at bjóða pensionistum, ið heimarøktin ávísir, at keypa døgurða og fáa hann bornan til hús.

Í hesum sambandi verur biðið um tilboð at gera uml. 8 døgurðar hvønn dag.

Møgulig tilboð skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagið 1. august 2005.

Áhugaði kunnu venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 44 71 58 gerandisdagar millum kl. 8.30 og 16.00

**Sjóvar kommuna**
Skúlavegur 10
490 Strendur

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Reingerðisfólk til Føroya Læraraskúla

Lýst verður eftir reingerðisfólkum til Føroya Læraraskúla. Annað til 4 tímar um dagin, hitt 2 tímar um dagin.

Arbeiðstíðin er allar skúladagar frá kl. 14.30 til 18.00.

Starvið verður sett frá 15. august.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið.

Tey, ið vilja hava meira at vita, kunnu seta seg í samband við skúlatænaran Einar Skála, á telefon 213508. Teldupostur kann sendast til flsk@flsk.fo.

Umsóknir skulu verða skúlanum í hendi innan 1. august 2005.

Tórshavn 6. juli 2005
**Føroya Læraraskúli**
Postrúm 348
110 Tórshavn

# Lýsing eftir dagrøktarum

Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 15. august 2005 ella skjótast eftir hetta.

Størvini, talan er um, eru tíðaravmarkað fyribils til 1/2 ár til 15. februar 2006.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsningar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 214950.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 1. august 2005 kl. 15.00.

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 6. juli 2005

**Fuglafjarðar kommuna**